gult12 cyan12 magenta12 svart12




# Tímalærarastørv á Føroya Læraraskúla

Á Føroya Læraraskúla, sum hevur læraraútbúgving og pedagogútbúgving, eru hesi størv leys at søkja komandi skúlaárið:

Eitt starv fulla tíð í **sálarfrøði, námsfrøði og námsfrøðiligum serlestri**.
Eitt starv 6 tímar um vikuna í **enskum**.

Størvini verða sett frá 1. august 2001.

Umsøkjarar skulu skjalprógva neyðugan undirvísingarførleika. Innlit og royndir í undirvísing á lærara- og pedagogútbúgving eru ein fyrimunur.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Magistarafelag Føroya og Føroya Landsstýri.

Áhuga, sum vilja vita meira, kunnu seta seg í samband við Paula Nielsen, rektara, tlf. 313501, teldupostsamband paulini@flsk.fo

Umsóknirnar skulu stílast til:

**Føroya Læraraskúla**
Postrúm 348 · FO-110 Tórshavn

Umsóknarfreistin er úti 1. juli.

Tórshavn 14. juni 2001

# DAEWOO MATIZ A

Lítil fittur 1 1/2 ára gamal Daewoo Matiz A, koyrt 15.000 km, sera økonomiskur, er sum nýggjur. Væleganður til býarkoyring. Prísur 70.000 kr.

**Tlf. 319489 ella 219489**

# Byggibúgvin grundstykkir

Fuglafjarðar kommuna lýsir hervið 6 byggibúgvin grundstykkir við Sevdalsvegin í Fuglafirði til sølu fyri kr. 90,00 fyri fermeturin. Stykkini, sum eru á økinum frá sethúsunum hjá Valdemari Ennigarð og suður til sethúsini hjá Carsten Petersen, eru 575 og 586 fermetrar til víddar.

Áhugað verða biðin um at seta seg í samband við býráðsskrivstovuna telefon 444006.

Fuglafjørður, tann 14. juni 2001
**Fuglafjarðar kommuna**

# Tofta skúli

Søkt verður eftir lærarum til Tofta skúla skúlaárið 2001/2002:

- 2 størv 26,5 tímar fyri lærarar í farloyvi
- 1 starv 26,5 tímar
- 1 starv uml. 15 tímar til serligan tørv

Størvini, sum eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2001 /2002, verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 447332.

Umsóknirnar skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. juni kl. 16.00.

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum!

**Skúlanevndin í Nes kommunu**
v/ Elin á Torkilsheyggi
655 Nesi

SMS søkir eftir

# húsi í Tórshavn

til tvey vaksin og eitt barn.
Húsini mugu verða klár at flyta inn í innan 1. august 2001.

Áhugaði verða vinarliga biðin um at ringja til tel. 22 13 99.

SMS

P/F SMS POSTBOKS 1059 FO-110 TÓRSHAVN TLF. 313041 FAX 317434




# Hjálparfólk til Dagstovnin í Gøtu

Fyri hjálparfólk í farloyvi verður søkt eftir einum hjálparfólki til barnagarðsstovu við 21 plássum, 4-6 ár

– at arbeiða 30 tímar um vikuna frá 1. august 2001 til 1. august 2002.

– Løn og setunarviðurskiftir annars eru sambært sáttmála við Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lok 10.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, viðmælum o.a. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. juli 2001.

**Dagstovnurin í Gøtu**
511 Gøtugjógv

# Tvøroyrar Kommuna

Við hesum verður starv sum verkfrøðingur lýst leyst at søkja.

**Høvuðsverkevni:**
- Leiðsla á Teknisku Deild.
- Projekteringsarbeiði og eftirlit.
- Uppmátingar-, kortleggingar- og skrásetingararbeiði.
- Býar- og byggiplanlegging.
- Málsviðger og ráleggingararbeiði.
- Stýring av kommunalum viðlíkahaldsarbeiði.
- Luttøku í dagligum umsitingarligum uppgávum v.m.

**Førleikakrøv:**
- Verkfrøðingur ella onnur viðkomandi. útbúgving.
- Royndir í omanfyri nevndu arbeiðsøkjum.
- Førleiki í projekteringsarbeiði og byggilist.
- Munnligan og skrivligan málførleika (eisini í enskum).
- Hollan telduførleika.
- Opin og fyrikomandi.

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til býráðsskrivstovuna á telefon 371085.

Starvið verður at seta sum skjótast.

Skrivlig umsókn, saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 01.08.2001.

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg

Sosialurin
www.sosialurin.fo


gult13 cyan13 magenta13 svart13


# Vikuskifti

Nr. 113 • leygardagur • 16. juni 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


Rani um Garry:

## Vón um gjøgnumbrot



Lesið á síðu 2

## Ríðistevna í Vágum

*Vága Ríðingarfelag*

Í dag, leygardagin, skipar Vága Ríðingarfelag fyri árligu ríðistevnuni niðri við vatn.

Stevnan byrjar kl 15.00. Tá kemur Íslandsrossafelagið at sýna fram gonguløg, og síðan byrjar sjálv kappingin. Kappast verður í trav, skeið, tvíspor ung og tvíspor vaksin II og I flokkur.

Um fjøruti ross luttaka. Aftaná er ætlanin at skipa fyri old boys kapping. Síðan verður togtogan millum rossamenn úr Vágunum og rossamenn úr Havnini og aðra staðni.

Tá liðugt er á ríðibreytini verður farið oman á Flúgvarabedingina til ponyríðing, MBM synir fram útgerð til rossabrúk og ymisk amboð til landbúnaðin. Møguleiki verður hjá børnunum, at royna vælumtøktu hoppiborgina. Kl 21.30 verður stóra bálið tendrað, har sungið verður saman við Sámal Ravnsfjall. Mina Reinert fer at halda midnáttarrøðuna.

Aftaná spæla Sámal og vinmenn til dans, sigur Vága Ríðingarfelag.



## Amariel í Glarsmiðjuni

LISTAFRAMSÝNING
*Eirikur Lindenskov*

Komandi vikuna verða 25 listarverk hjá Ameriel Norðoy at síggja í glarsmiðjuni í Bøgøtu í Havn.

– Eg fari at sýna fram akvarellir, pastellir, oljumálningar og nakrar skravimyndir, har eg hava skrava í plátur, sigur Amariel Norðoy.

Myndirnar verða at síggja í vindeyganum í kvøld, men framsýningin er annars opin meðan rammuhandilin er opin í næstu viku, gerandisdagarnar frá kl 10-17[30] og leygardagin frá 10-12[30].



*Í sambandi við 40 ára føðingardagin sýnir Anker Mortensen fram eini 100 av listarverkum sínum í Listaskálanum í Havn. Á ferniseringini í dag kemur eisini út bók við verkum hjá listarmanninum og við yrkingum hjá Tóroddi Poulsen – men málarin hevur eisini nakrar yrkingar sjálvur…*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Hvussu verður vindur málaður á lørift?

LISTAFRAMSÝNING
*Eirikur Lindenskov*

Í dag klokkan sekstan letur upp listaframsýning í Listaskálunum í Havn. Tað er Anker Mortensen, listarmaður, sum í sambandi við 40 ára føðingardagin sýnir fram eini 100 av listarverkum sínum.

– Tað vera bæði oljumálningar, tekningar og grafikkur at síggja, sigur Anker Mortensen.

Í sambandi við dagin gevur listarmaðurin eisini út eina bók við yrkingum, teksti og nógvum myndum. Bókin er 48 blaðsíður, og í sambandi við ferniseringina fæst hon til keyps fyri 100 krónur í Listaskálanum í dag. Í bókabúðunum kostar bókin 150 krónur.

Tær flestu yrkingarnar í bókini eigur Tóroddur Poulsen, men listarmaðuin sjálvur eigur eisini onkar.

Anker Mortensen málar bæði í Føroyum og í Danmark.

– Eg havi atelier bæði í herheima og niðri, sigur hann.

Seinastu árini hevur hann málað í gomlu smiðjuni hjá Hans hjá Luterusi – ella kanska rættari í ostagoymsluni hjá Meiarínum í Havn, gróthúsið aftanvert gamla reinsaríið í Tórsgøtu.

– Eg veit ikki, hvussu leingi smiðjan hjá Hans var har, men í gomlum døgum goymdu teir ost har. Mær er fortalt, at teir spulaðu ostin í kjallaranum og goymdu hann í erva, sigur Anker Mortensen, sum leggur afturat, at eingin deymur av osti er longur – heldur franskur terpentinroykur…

Framsýningin hjá Ankeri Mortensen í Listaskálanum er opin fram til 15. juli – men hann hevur kortini nógv jørn í eldinum:

– Tað næsta verður ein framsýning á »Den Nordiske« tann 11. august. Síðani á »Den Fri Udstillingsbygning« í Keypmannahavn, og í februar skal eg sýna fram í Galleri Trap í Vesterbrogade, sigur Anker Mortensen.

Tá mentanarhúsið, Norðurlendska Bryggjan, letur upp í 2003, verður Anker eisini eitt av listarfólkunum úr Føroyum, sum skal sýna fram saman við listarfólkum úr Íslandi og Grønlandi.

Framsýningin í Listaskúlanum verður opin til 15. juli.

## Ælabogasílregn

tað gevst ikki at regna í dag
áirnar
tað slítur ikki í
áirnar vaksa
tað singlar niður
áirnar vaksa størri
tað prikkregnar á blikktakið
áirnar vaksa størri og longri
tað prikkregnar á blikktakið á atelierinum
áirnar vaksa størri og longri enn penslarnir
blikktakið á atelierinum í Havn
áirnar vaksa størri og longri enn penslarnir
og kroysta brenda umbra oljulitatubustrípan

tað regnar enn
skal eg mála regn við fronskum terpintini
í Havn
tað regnar vatnlitir

ella mála sól tá ið tað blikkregnar á prikktakið
ella regnlitir
á takprikkið
skýggj loysna og regna
og regna á blikktakið
tað takdryppar í ánna
áin er longri enn japanskt guli pensilin
áin er longri enn kadmium reyði pensilin
áin er longri enn egyptiskt violetti pensilin

áin regnar ígjøgnum penslarnar
í hyljalitir
sum perlur í eygum

hvussu verður vindur málaður á lørift
hann trilkar gulið
vindurin
rundan um teir sjey heyggjarnar í Havn

kombik egyptiskt violetti Vaktarhúsheyggur
har eygað sá ælabogasíl
korkalitti Glaðsheyggur
regnið í lógvanum
kinesiski Heygurin Mikli
oyra í sirmi
rabarbugrøni Heksheyggur
við bløðandi knæði
mánaguli Høgareynsheyggur
við bláum andadrátti
Nabbheyggur
undir sprøklutum skýggjum
Perluheyggur
í grágrønum nasamjørka

tað regnar í sprøklutum litum

*Anker Mortensen*